

Magnus og Jón ganga í 10. flokki í Klaksvík, eru vinmenn og arbeiða saman eftir skúlatíð, tá tørvur er á tí



- Tað er gott at forvinna sær nøkur oyru á henda hátt, sigur Jón

*Vit hava gjørt so nógv ymiskt hesa tíðina – reinsa áirnar, hildið veitirnar opnar og annar gjørt ymisk viðlíkahaldsarbeiði*

# Gott við nøkrum krónum

Hjá tveimum ungum og virkisfúsum monnum sum Jóni og Magnus er gott at fáa nøkur oyru til vega til dagliga forbrúkið.

Tá teir í síni tíð byrjaðu, vóru teir einir fýra ungir dreingir til arbeiðis fyri kommununa.

Tveir teirra, sum vóru eitt sindur eldri enn Jón og Magnus, eru nú farnir úr skúlanum og í annað arbeiði.

Hetta verður tí helst seinasta árið at teir báðir vinmenninir í 10. flokki í skúlanum á Ziskatrøð koma at arbeiða soleiðis saman og forvinna sær nøkur oyru.

- Jú, hetta kemur væl við, serliga tá ein ikki fær eitt einasta oyra í studningi, slær Jón fast. Og hann leggur aftrat:

- Skal man fáa studning, so má ein altso búgva á útoyggj!


## Laborantur/tøkningur til Kemilux



Vit bjóða tær eitt spennandi og avbjóðandi starv í eini fyritøku í rúkandi menning, her heima so væl sum í útlondum. Arbeiðsuppgávurnar hjá tær fara m.a. at fevna um:

- luttøku í menningini av nýggjum og verandi vørum
- at taka sýni úr framleiðsluni
- innkeyp av ráværu
- gerð av vaskiætlanum/vaskiskeið til virkir og stovnar
- samskifti við veitarar og viðskiftafólk

Vit vænta, at tú ert ídnaðarlaborantur/tøkningur, ella hevur aðra samsvarandi útbúgving. Tú ert eisini før/ur fyri at hugsa og arbeiða sjálvstøðugt og ert uppsøkjandi av lyndi. Tú dugir at gera framløgur og at arbeiða við Excel. Vit vænta eisini, at tú dugir at samskifta á enskum og skandinaviskum. Tú fert at virka í tøttum samstarvi við leiðslu og góðskuleiðara. Arbeiðstíðin er í løtuni 30 tímar um vikuna. Løn og setanarviðurskifti annars verða eftir avtalu.

Umsóknin, sum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 25/2, skal sendast til:

P/F Kemilux
Postboks 1231
Mykinesgøta 1
FO-110 Tórshavn

- ella til: johannaz@kemilux.com

Vilt tú vita meira um starvið, so ring á 350830 og spyr eftir Jóhonnu.

*Føroyska fyritøkan KEMILUX bjóðar eina fullfíggjaða skrá av reingerðarevnum til fiski- og matvøruídnaðin umframt vanliga húsarhaldið. Eisini hava vit stórt úrval av amboðum og tólum í sambandi við øll øki innan reingerð í vinnuni so væl sum í húsarhaldinum. Umleið triðingurin av framleiðslu okkara verður seld uttan fyri Føroyar.*

*KEMILUX framleiðir eftir altjóða ISO:9001 góðskuskipanini. KEMILUX er skrásett hjá Achilles sum góðkendur veitari til m.a. oljuvinnuna. Allar vørur okkara, til heimamarknaðin so væl sum til útflutning, verða framleiddar samsvarandi lógum og reglugerðum hjá EF og teimum londum, sum útflutt verður til.*

*KEMILUX hevur sum aðalmál at vera fremsti veitarin av dygdarbestu reinsi- og vaskievnum, tilhoyri og amboðum til vinnu og ídnað so væl sum til húsarhald og stovnar.*

MJ MEDIA tlf 219776

**KEMILUX**